# Ársins einstaklingur/bólkur

## The Dreams

Føroyski rockbólkurin buldrar fram uttanlands, og nú hava teir av álvara vunnið seg seg inn á týska marknaðin. Í heyst hava teir havt nógvar framførslur kring Týskland, og sangir hjá teimum eru givnir út har. Í Danmark eru teir framvegis eitt populert navn, og onnur lond vísa áhuga fyri føroyska rockbólkinum.

*Atkvøð fyri The Dreams: Send »pla bl1« til 1906*





## ORKA

Nýskapandi og sermerktur bólkur, sum fær tey undarligastu ljóðførini at rigga í sínum egna samanhangi. ORKA osar av orku, teir duga framúr væl at framføra live, og tað hava teir víst bæði heima og burturi. Alt botnar í frálíkum tónleiki, sum teir sjálvir smíða.

*Atkvøð fyri ORKA: Send »pla bl2« til 1906*

## Páll Finnur Páll

Tað slepst ikki undan Páll Finnur Páll í føroyskum tónleiki í løtuni. Bólkurin við teimum mongu kendu sangunum hevur seinastu tvey árini av álvara sligið sítt navn fast í føroyskum tónleiki, og í ár hava teir serliga brillierað við fantastiskum live-framførslum.

*Atkvøð fyri Páll Finnur Páll: Send »pla bl3« til 1906*





## Týr

Í fleiri ár hava tónleikararnir í Týr ferðast kring alt Europa – og aðrastaðni eisini – við sínum mergjaða rocktónleiki. Týr selir eisini fløgur, sum eingin annar føroyskur bólkur uttanlands, og teir hava veruliga víst føroyingum, hvussu tað ber til at gera originalan rocktónleik við festi í føroyskari mentan.

*Atkvøð fyri Týr: Send »pla bl4« til 1906*

## Hanus G. Johansen

Í ár rundaði Hanus G. Johansen 60 ár, og hetta er samstundis árið, har hann gav tvær fløgur út. Hanus er í stórformi á nýggju fløgunum, og á konsertum hevur hann eisini víst, at hann er betri enn nakrantíð áður. Ein verulig legenda í føroyskum tónleiki, sum framvegis imponerar við útgávum og framførslum.

*Atkvøð fyri Hanus: Send »pla bl5« til 1906*



# Besti nýggi bólkur/einstaklingur

## Grandma's Basement

Frísku fýrarnir í Grandma's Basement hava havt eitt gott ár. Eftir at teir hava gjørt vart við seg á konsertum, tóku teir eitt veruligt stig inn á føroyska tónleikapallin við teirra fyrstu útgávu. Og teir hava fingið fleiri hitt millum føroyskan ungdóm. Hon fær ongantíð nokk hevur verið nógv at hoyra, og sangir sum Gay og Getze eru eisini blivnir kendir. 2010 hevur verið gjøgnumbrotsárið hjá Grandma's Basement.

*Atkvøð fyri Grandma's Basement: Send »pla bn1« til 1906*

GRANDMAS BASEMENT



## Hamferð

Tey kalla tað doom-metal. Tað er harður, myrkur rocktónleikur, og Hamferð spæla hetta slagið av tónleiki so væl, at bólkurin vann talentakapping fyrr í ár. Tað hevði við sær framførslur á stóru festivalinum, og har vísti bólkurin, at hann hevur nakað heilt serstakt og spennandi at bjóða. Og nú er bólkurin júst komin við nýggjari útgávu og fyri framman bíða konsertir kring landið.

*Atkvøð fyri Hamferð: Send »pla bn2« til 1906*

## Anna Faroe

Nógv hava vitað um Annu Nygaard, at hon hevði talent, og veruliga kundi blíva til nakað innan tónleikin. Hon hevði vunnið Ársins songrødd og spælt nakað kring landið, men tað var í X Factor kappingini hjá DR, at hon av álvara gjørdi vart við seg. Hon sang framúr væl, dugdi væl at framføra, og endaði sum ein av profilunum í X Factor. Í ár gav hon eisini fyrstu fløguna hjá sær í Danmark.

*Atkvøð fyri Annu: Send »pla bn3« til 1906*







## Bárður Johannesen

Við útgávuni Ancient Forgotten Stories stígur Bárður Johannesen av álvara inn í ljósið sum tónleikari. Hann var mest sum eitt óskrivað blað áðrenn hesa útgávuna, men hann vísur seg sum ein góðan sangskrivara og sangara. Hann skrivar penar sangir og syngur teir væl, og hann gevur greiðar ábendingar um, at hann eisini eigur meira í sær til komandi útgávur.

*Atkvøð fyri Bárði Johannesen: Send »pla bn4« til 1906*

## Fróði Hansen

Seinastu tvey árini hevur Fróði Hansen verið alsamt meira virkin sum tónleikari og sangskrivari. Í fjør kom fløga út frá honum, og í summar var ein EP send út. Við langa heitinum Patience is a motherfucker when you are living life in slow motion ger Fróði Hansen aftur vart við seg, og hann hevur í ár havt framførslur í Danmark.

*Atkvøð fyri Fróða Hansen: Send »pla bn5« til 1906*

